## Fíggjarkreppa í Formel-1

Fleiri fjepparar fegnaðust, tá tað var greitt, at eitt amerikanskt lið skuldi við í ársins útgávu av Formel-1. Helst fór hetta at merkja enn meira pening til ítróttina, men soleiðis verður helst ikki. USF1 er longu nú í somikið stórum fíggjarligum trupulleikum, at teir hava biðið um loyvi at sleppa frá at møta til fyrstu fýra Grand Prix'ini í ár, soleiðis at teir kunnu fáa fíggjarviðurskiftini í trygga legu.



## Dupult danskt EM-gull

Bæði kvinnur og menn hjá Danmark vunnu um vikuskiftið EM-gull fyri landslið. Kvinnurnar spældu sunnumorgunin móti Russlandi, og hendan dystin vann Danmark 3-2. Menninir spældi seinnapartin móti Póllandi, og her hevði Danmark ongar trupulleiki. Danmark vann nevnliga teir tríggjar fyrstu dystirnar, og so var ikki neyðugt at spæla meira enn tað sama.

### TB-Fleyr 2-3 (23-25, 25-7, 25-23, 19-25, 12-15):

# Fleyr kom sterkt aftur

**Hetta var dysturin, har TB skuldi tryggja sær trumfin í kappingini um FM-finaluna, men í staðin streyk Fleyr avstað við øllum**

TB hevur leingi sæð út sum størsti favoritturin at koma í FM-finalurnar í Eik-liguni hjá kvinnum ímóti SÍ, og soleiðis sær TB framvegis út. Men ikki skerst burtur, at tapið fyri Fleyr fríggjakvøldið gav skeinur í lakkið.

Fleyr hevur jú verið tað av liðunum, ið minst hevur livað upp til tað, sum væntast kundi av liðnum, men fríggjakvøldið gjørdi liðið úr Havn júst tað, sum hevur manglað í ótaljandi dystum í vetur. Tí eydnaðist eisini at taka ein rættiliga óvæntaðan sigur ímóti TB – enntá í Trongisvági!

Sum so ofta fyrr í vetur, megnaði Fleyr at fylgja væl við í fyrsta setti, sum var sera javnt, og tað endaði við, at Fleyr vann tað. Men longu í øðrum setti var vent í holunum – og tað so ógvusliga, at TB tók settið í knúsandi stíli.

**Fleyr knekkaði ikki**

Vanliga hevði hetta verið nóg mikið til at knekkað Fleyr, men kortini fekk liðið reist seg og givið TB mótstøðu allan vegin í triðja setti, sum TB tó vann við tveimum stigum.

Hevði alt verið, sum tað plagdi, so hevði hetta við vissu verið eitt settúrslit, ið hevði beint fyri Fleyr. Men tvørturímóti vísti tað seg, at Fleyr var júst so vandamikið at spæla ímóti, sum tað ofta er við liðum, ið ikki verða mett at hava nakað at spæla fyri.

Fleyr reistist og menti seg uppaftur meira í fjórða setti, sum varð vunnið rímiliga sannførandi, og í fimta setti, sum skuldi avgera tað heila, helt Fleyr høvdið kalt og fór allan vegin, hóast liðini fylgdust og støðan var 8-7, tá tey skiftu síðu.

Við 3-2 sigrinum er Fleyr ikki longur burturi, enn at talan saktans kann gerast um heiðursmerki. Fyri TB merkti tapið, at liðið framvegis eitt stig framman fyri Mjølnir og tvey framman fyri Fleyr og Drátt, og haraftrat eiga tvørakvinnur ein dyst á. Men tær hava ikki ráð at missa meira, skulu tær røkka allan vegin í finaluna.

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 | - | 1 | 43 | 8 | 35 | 17 |
| 2 TB | 15 | 11 | - | 4 | 38 | 18 | 20 | 13 |
| 3 Mjølnir | 15 | 10 | - | 5 | 35 | 21 | 14 | 12 |
| 4 Fleyr | 16 | 9 | - | 7 | 32 | 27 | 5 | 11 |
| 5 Dráttur | 16 | 8 | - | 8 | 31 | 26 | 5 | 11 |
| 6 ÍF | 16 | 2 | - | 14 | 7 | 43 | -36 | 2 |
| 7 KÍF | 15 | 0 | - | 15 | 2 | 45 | -43 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 15 | 12 | - | 3 | 38 | 15 | 23 | 17 |
| 2 SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 3 Fleyr | 15 | 6 | - | 9 | 31 | 32 | -1 | 8 |
| 4 ÍF | 15 | 0 | - | 15 | 3 | 42 | -39 | 0 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Tjaldur | 16 | 14 | - | 1 | - | 1 | 477 | 354 | 123 | 29 |
| 2 Stjørnan | 15 | 13 | - | 1 | - | 1 | 440 | 298 | 142 | 27 |
| 3 Neistin | 15 | 8 | - | 0 | - | 7 | 394 | 372 | 22 | 16 |
| 4 VÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 355 | 425 | -70 | 8 |
| 5 StÍF | 15 | 4 | - | 0 | - | 11 | 357 | 446 | -89 | 8 |
| 6 VB | 16 | 2 | - | 0 | - | 14 | 342 | 470 | -128 | 4 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 15 | 12 | - | 0 | - | 3 | 484 | 394 | 90 | 24 |
| 2 KÍF | 15 | 7 | - | 1 | - | 7 | 389 | 408 | -19 | 15 |
| 3 H71 | 15 | 5 | - | 3 | - | 7 | 400 | 407 | -7 | 13 |
| 4 StÍF | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 400 | 412 | -12 | 13 |
| 5 Kyndil | 15 | 6 | - | 1 | - | 8 | 358 | 409 | -51 | 13 |
| 6 VÍF | 15 | 6 | - | 0 | - | 9 | 441 | 442 | -1 | 12 |

# Sterkar danskar kvinnur

**Hvørki føroyska A- ella U21-landsliðið megnaði at skala donsku U18-kvinnurnar, sum í kvøld spæla móti Danmark**

Tað er ikki fyri einki, at Danmark verður roknað millum sterkastu hondbóltstjóðir í heiminum.

U18-kvinnulandsliðið vann fyri stuttum EM-heitið, og tær vitja í hesum døgum í Føroyum.

Leygardagin spældu tær móti føroyska A-landsliðnum, sum fyrireikar seg til Challenge Trophy-kappingina, sum verður spæld um hálvan annan mánað, og her fingu okkara av at vita.

Longu eftir 10 minuttum stóð 1-10 á máltalvuni, og so var støðið líka sum lagt. Donsku genturnar spældu við eini leikferð, sum okkara høvdu sera ilt við at umstilla seg til, og hóast avrikið batnaði nakað eftir steðgin, so vóru føroysku kvinnurnar ongan tíð námind at hótta donsku mótstøðuna.

Tað vóru føroysku U21-kvinnurnar heldur ikki sunnudagin, men tær megnaðu tó í nógv størri mun at fylgja við mótstøðuni. Bæði tí tær dagin fyri høvdu sæð, hvussu sterk mótstøðan í veruleikanum var, og kanska eisini tí donsku kvinnurnar nú høvdu ein dyst í beinunum.

Undan steðginum eydnaðist tó donsku kvinnunuum at leypa avstað, og í seinna hálvleiki skrædnaði veruliga í dystinum, sum enn einaferð endaði við donskum stórsigri.

Í kvøld klokkan 19 spæla donsku kvinnurnar í Klaksvík, har nýkosnu steypavinnararnir úr Stjørnuni taka ímóti. Og so fæst at vita, um tær í størri mun megna at geva mótstøðuni ein skarpan gang.

**Føroyar A-Danmark U18 17-34 (8-20)**
**Føroyar U21-Danmark U18 20-32 (12-17)**
**mørk**

## Máltindarnir, hondbóltur

| Sunset-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| Adina Petrea | Tjaldur | 164 (10) |
| Cornelia Rimbu | Tjaldur | 114 (23) |
| Liljan Djurhuus | VÍF | 105 (31) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 97 (17) |
| Simona Petersen | Stjørnan | 95 (16) |
| Valentina Suciu | Stjørnan | 87 (17) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 65 (18) |
| Roxanna Bodirlau | StÍF | 63 (3) |
| Anja Heinadóttir | Neistin | 57 |
| Fríðrún B. Danielsen | StÍF | 54 |
| Adriana Bobra | StÍF | 53 (29) |
| Svava Vestergaard | VB | 52 |
| Annika Thomsen | Tjaldur | 51 |
| Bára Mortensen | VB | 49 |
| Una Egilsdóttir | VB | 49 (12) |

| Atlantic Airways-kappingin | | Mál (br.) |
|---|---|---|
| David Edvardsen | Neistin | 120 (26) |
| Cristian Preda | StÍF | 99 (6) |
| Poul Kjartan Dam | H71 | 97 (15) |
| Sámal Joensen | VÍF | 97 (32) |
| Bjarti Hansen | VÍF | 81 |
| Dánjal Tórgarð | H71 | 79 (27) |
| Finnur Hansson | Neistin | 75 (11) |
| Gabriel Stanciu | StÍF | 74 (28) |
| Jugoslav Djumic | Neistin | 71 |
| Ási Dam | KÍF | 63 (39) |
| Janus Sørensen | H71 | 62 |
| Niklas Reginsson | KÍF | 60 (6) |
| Høgni Klein | Kyndil | 59 |
| Bárður Johannesen | Kyndil | 59 (1) |
| Agnar Joensen | VÍF | 58 (6) |